Dagbladets kolde krig

I dansk politik er man vant til lidt af hvert. Livet på Christiansborg kan være ganske hårdt. Personangreb og skarpe albuer hører til dagens orden.

Alligevel kan man, som dansker med en veludviklet interesse i færøske forhold, ikke undgå at blive rystet over det debatniveau, der i øjeblikket præger Dagbladets spalter.

Udgangspunktet er imidlertid klart nok — Óli Breckmann har også gjort sig bemærket i det danske politiske liv. Men på en måde som vi ellers kun kender fra 30'ernes oplysningstid. I metodevalg og aggressiv stil tilhører han en anden tid og tages derfor heller ikke alvorligt.

Desværre ser det i øjeblikket ud til at forholde sig anderledes på Færøerne. Dagbladet bringer den *13. juni 1988* en artikel af Lydia Arge, der i perfiditet og løgnagtighed næppe overgås af Óli Breckmann selv.

Men citatfusk af den mest primitive karakter er hovedkonklusionen, at det danske socialdemokrati åbnede Danmark for Hitler.

Stauning burde under 2. verdenskrig have kæmpet som Frederik den Store af Preussen. Med sine undladelsessyndere har han lagt grunden for marxismens stræbende hærgen.

Al respekt for Stauning til trods, er dette nok for megen betydning at tillægge grundlæggeren af den nordiske velfærdsmodel. Stauning besad imidlertid nogle dyder, som Dagbladet kunne lære meget af, realisme og beskedenhed. Lydia Arges påstand om, at Stauning med sin neutralitetspolitik forårsagede, at land og folk blev underlagt den tyske besættelsesmagt, svarar til at Danmark i dag skulle gøre sig selvstændige militære forhåbninger overfor stormagterne. Dengang kom ingen Danmark til hjælp, ligesom de allieredes bistand i Norge også i begyndelsen var af symbolsk karakter. Derfor havde Stauning kun eet at gøre. Med en tysk trussel om at lade datidens luftflåde »Luftwaffe« bombardere de danske byer, måtte han tage den tungeste af alle mulige beslutninger og overgive sit land i protest.

Dette fik de allieredes fulde forståelse. Danmark blev efterfølgende selv anerkendt som allieret og den store internationale anerkendelse fik Danmark, da en anden socialdemokrat, — Hans Hedtoft modtog oplysninger om jøde-deportationerne i Danmark og fik iværksat den store redningsaktion, der stadig også internationalt gælder som et mønster for et humant samfund.

Verden er en anden idag, — også selvom Dagbladet ikke har opdaget det. Ændringerne i Sovjetunionen, glasnost og det forbedrede forhold mellem stormagterne er gået hen over hovedet på denne avis. I dag er vi i en situation, der peger hen mod en nedbrydning af Jalta-delingens Europa. Spørgsmålet er, om man vil være med og yde en indsats, — det vil Dagbladet ikke, — for den avis var jerntæppet stadig godt nok, — den kolde krig vidste man, hvad var.

For Socialdemokratiet er det anderledes. Det var samme Hans Hedtoft, der bragte Danmark ind i NATO og lige siden har det været Socialdemokratiets mål at forbinde et rodfæstet alliancetilhørsforhold med en aktiv nedrustningspolitik.

Det er lykkedes så godt, at næsten 65% av den danske befolkning går ind for NATO. Men efter en undersøgelse, der er offentliggjort i USA's regering går 85% ind for Norden som atomvåbenfri zone, og 45% også selv om det skulle gå ud over Danmarks alliancetilhørsforhold.

Tallene fortæller, at Danmarks medlemskab af NATO ville være truet, hvis ikke man forfølger den dobbelte målsætning, der hedder afspænding og ro om Danmarks alliancetilhørsforhold. Det er den politiske indsats for hver af disse to hovedsætninger, som Socialdemokratiet er garanten for, og som Dagbladet gang på gang modarbejder i sine spalter.

Allan Henriksen
international konsulent
6. juli 1988



Lydia Arge skrivar:

Danski Javnaðarflokkurin legði Danmark opið fyri Hitler

Stauning, leiðari danska Javnaðarflokkin og forsætisráðharri Danmarkar, sveik Danmarkar frælsi við sínum avdubbingarpolitikki og bláoygda »friðarvilja«.

Sama sinnalag eyðkennir okkara sosialistisku flokkar í dag. Fyrimyndin í Føroyum er enn Stauning.

Thorvald Stauning — grundleggjari av sosialismuni í Føroyum — hevði júst somu støðu til verju- og trygdarpolitikk, sum flestu vinstrahallu hava í dag.

Lurta bara til støðuga niðurlagið hjá t.d. Atla Dam: »friður«, »A-frítt umráði« eru fyri honum leiðin til »frið og ongan vanda«, hóast søgan um Stauning átti at virka sum ræðandi fyridømi. Maðurin, sum sjálvur valdi rakstrarrópið, »Vel Stauning ella kaos«, gav Danmark bæði Stauning og kaos.

Men av tí, at vinstrasosialistar minnast stutt, serliga síni egnu ræðuliga mistøk við órættiligum fylgjum, endurtaki eg fegin úttalilsi Stauning bæði undan og undir herseting Danmarkar. Avgerðir Staunings góvu Hitler bestu treytir, tá hann leyp á og hertók Danmark 9. apríl 1940 og elvdi landi og fólki til sonevndu »fimm bannaðu árini.«

KENNIR SEG IKKI HÓTT«

Tann 5. apríl 1929 segði Stauning um avvápnaðarpolitikkin í Danmark á fundi í Geneve: »Danmark kennir seg ikki hótt av grannunum.«

Tann 1. juli 1936 bar týski greivin, von Renthe Finck, igjøgnum uttanríkisráðið í Berlin heilsu frá Hitler og segði, at hann hevði størsta áhuga í Danmark, einum landi, sum hann visti nógv um og ynskti at fáa besta samband við.

Úrslitið bleiv »Europäisch Neuordnung«, europeisk nýhugsan (glasnost) ella nýskipan (perestroika).

Tann 15. november 1938 segði Stauning: »Eg firnist ikki framtíðina — leysatíðindi um at kalla inn eykamanning til her og flota hava ongan botn í veruleikanum.«.

»ÁLIT Á HITLER«

Tann 8. mars í 1938 segði Stauning: »Eg havi álit á Hitler. Av tí at Danmark ikki hevur klandursmál við onnur lond, hava vit ikki annað at gera enn vísa uttanveldaða støðu. Harmiligt, at danir finnast, sum eru tilreiðar at vísa ódanskan atburð í politiska valstríðnum.

Eg minnist orð týska førarans, sum benda á, at ætlanir hansara eru ikki útflutningsvøra. Vit líta á hetta lyfti, sum er givið úr hægsta stað, at Týskland ger ikki krav eftir øðrum londum í Europa.«

Saman við øðrum politikarum við ábyrgd avvápnaði Stauning Danmark, gjørdi gjøldur burtur úr donsku verjuni, so yvirmenn og hermenn høvdu lægst hugsandi umdømi millum manna.

DANMARK VERJIR SEG IKKI

Tá ein av fregnarmonnum Hitlers spurdi Stauning, um Danmark var sinnað at verja sína uttanveltaðu støðu, um tað varð álopið, svaraði Stauning: »Danmark hvørki vil ella kann verja seg.«

Stutt eftir kom hersetingin — júst eftir tí leikriti, sum Hitler skrivaði, Mein Kampf. Hitler skrivaði: »Ein og hvør propaganda skal vera lættfatað og leggja andliga støðið eftir fatanarevnunum hjá tí mest avmarkaða av teimum fólkum, hon miðar eftir at sannføra.«

Ein kongur, sum er verdur at nevna í sambandi við tvørrandi verjuvilja Stauning, er Fríðrikur Mikli av Preussen í 1700-talinum. Hann verður roknaður fyri ein av størstu og undrunarverdu persónleikum í Europa.

Hann dugdi væl diplomati og verjupolitikk, men kendi eisini menniskjansligt atlit í valdleikinum innan- sum uttanlendis.

Hann førdi fram »Lívið er eitt stríð — og tann, sum ikki vil stríðast, hevur ikki uppiborið lívsins gávu.« Fríðrikur Mikli visti, at land hansara var kringsett av fíggindum, og at ein sterk og vælskipað verja er neyðug.

DRÁPSMENN OG SKAÐADÝR

Fyrstu árini av herseting Danmarkar av týskinum kallaðu fólk frælsisstríðsmenn og mótstøðufólk fyri »drápsmenn og skaðadýr«, sum landsinleiðandi politikarar vinstrahallu við Stauning á odda ílnaðust inn á.

Tann 3. mars segði Stauning í røðu í danska studentafelagnum: »tað er einki yvir at dylja, at nakað nýtt er við at henda. Tað er óklókt og ósund at mótarbeiða tí gongd, sum tíð og umstøður føra við sær. Danmark má fyrireika seg til eina »europeiska nýskipan«.

Tann 4. mei 1942 doyði Stauning sum vóbrotin maður, tí øll hansara lívsáskoðan var endað í vanlukku fyri tað land, hann hevði leitt og villleitt. Hann fekk sum allir rættrúgvandi sosialistar í Danmark eina »borgarliga« (t.e. marxistiska og heiðna) jarðarferð í Forum. Ongin guðstænasta, ongin bøn og ongir sálmar. Myrkur og onki ljós, sum kvøður »Ei heldur gud vit líta á« í stríðsljómi altjóða sosialismunnar.

»KRÍGSGREÐINGAR«

Í dag verða tey á Dagblaðnum, sum eggja til eina tilvitan um verjuspurningar fyri »krígsgreðingar«. Tað verður gjørt, hóast ein átti a vita, at »frii heimurin« er hóttur sum aldri áður av einum diktaturi, sum sigur spaartvey til Hitlers Týskaland.

Í okkara tíð hevur marxisman kostað meir blóð og deyða enn verstu landfarsóttir, sum nakrantíð hava herjað heimin. Hóast øl prógv arbeiða vinstrasosialistar NATO av øllum alvi, hetta NATO, sum í 40 ár hevur tryggjað okkum friðin við atomvápnum, meðan óteljandi lond blivu offur fyri marxismunar drepandi herjan uttan atomvápn.

Hvussu bláoygd kunnu vit vera, tá vit hava søgunar ræðandi sosialistisku fyridømi?



Teknistovuleiðari

Søkt verður eftir leiðara til teknistovu verksins at byrja 1. august 1988 ella so skjótt tilber. Teknistovuleiðarin skal, við ábyrgd yvirfyri deildarleiðaranum á kaðaldeildini, hava ábyrgd av allari kaðaldokumentatión.

Harumframt er uppgávan hjá teknistovuleiðaranum, í samstarvi við kommunurnar og matrikulstovuna, at uppbyggja eitt datasavn við grafiskum EDV um allar kaðalleggingar o.a. Ein stór ætlan, sum tú fært ávirkan á.

Talan er um eitt støðugt starv og er teknistovan í løtuni mannað við 5 fólkum.

Av tí, at vit eru virkin viðvíkjandi skeiðvirksemi á øllum yrkisøkjum, bæði her og uttanlands, fært tú møguleika og frælsi at menna teg innan yrkið.

Umsøkjarar skulu hava holla útbúgving, t.d. tekn. ass., byggifrøðingur ella líknandi, og helst góðan kunnleika til kaðaldokumentatión.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Oddmar Olsson á tlf. nr. 1 1433.

Umsóknir við avritum av prógvum o.ø. verða at senda til
Telefonverk Føroya Løgtings, Postsmoga 27,
FR-100 Tórshavn, innan tann 10. juli 1988.

T·F·L
FØROYAR

Tinghúsvegur 3
Tlf. 1 1433
Fax. 1 6429

MAÐUR HEVUR
VANDAN
VIÐ – SUM IKKI AKTAR
KOYRISIÐ!